KÍ-ÍF:

# Kurt biður farvæl

**Bæði í Klaksvík og í Fuglafirði rokna teir seg at vera væl fyri undan uppgerðini, sum tann, ið møguliga fer at fáa fult í, fer at tryggja sær rættin at halda fram í bestu deildini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Felags fyri tey bæði liðini, sum í morgin fara á vøllin í Klaksvík, er, at tey ikki enn hava tryggjað sær rættin at halda fram í Formuladeildini, og at tey bæði fingu úrtøku fyri viku síðani. KÍ vann 5-1 á heimavølli móti VB, og ÍF vísti tenn í Gundadali, har teir megnaðu 1-1 móti B36, og um roknað verður út frá uppløgdum málmøguleikum, so er ikki at undrast á, at fuglfirðingar iðra seg um, at teir ikki høvdu alt við sær úr høvuðsstaðnum.

Hjá KÍ er tað greitt, at Kurt Mørkøre fer at spæla við fyri síðstu ferð. Hann hevur áður ikki minni enn tvær ferðir sagt barndómsfelagnum farvæl, men nú verður talan ógvuliga sannlíkt um síðsta farvælið á vøllinum. Nú fer Kurt aftur til Noregs, og aldurin meiri enn bendir á, at talan verður ikki um afturkomu til KÍ. Nú mugu klaksvíkingar læra at standa seg uttan Kurt Mørkøre.

Seinastu vikurnar hevur verið eitt sindur av kapping um plássini á KÍ liðnum, sum ikki hevur tapt tríggjar tær seinastu ferðirnar. Um tað eydnast KÍ at fáa fult móti ÍF, so verður tað fyrsta ferðin í ár, at KÍ fer at spæla fýra ferðir uttan at tapa. Tá ið KÍ vann móti VB vóru Niclas Niclassen, Leon Bjartalíð og fuglfirðingurin og fyrrverandi ÍF spælarin Høgni Madsen á beinkinum.

Klaksvíkingurin í Fuglafirði, Rúni Elttør, var leikbannaður, tá ið ÍF stríddi seg til stig í Gundadali. Hann er tøkur aftur. Tað eru eisini allir hinir, sum vóru við í høvuðsstaðnum. Hjá Poul Ennigarð gongst illa at sleppa av við vøddaskaðan aftanfyri í lærinum. Verjuspælarin verður ikki við í morgin.

- Hóast vit kundu havt fingið uppaftur meiri burturúr síðsta sunnudag, so hevur avrikið og úrslitið móti B36 heilt víst givið okkum mót um, at tað skal bera til at fáa úrtøku burturúr í Klaksvík, verður sagt í Fuglafirði.

Klaksvíkingar vóna, at tað fer at eydnast at fáa fulla úrtøku, nú tað framvegis stendur nógv á, og teir høvdu einki havt ímóti, at Kurt Mørkøre sigur KÍ fjepparunum farvæl við manér. Hjá Kurt sjálvum snýr tað seg ikki um, um hann telist millum málskjúttarnar, men heldur um at KÍ fær fulla úrtøku.

KÍ og ÍF hava spælt tvær ferðir fyrr í ár, men hetta er fyrsta ferðin, at liðini hittast í Klaksvík. Gongdin í báðum dystunum í Fuglafirði hevur verið rættuliga nógv upp og niður. Í 9. umfarinum, sum var á skránni 16. mai, vunnu Oddbjørn Joensen og hansara menn 3-0, og í 15. umfarinum, sum var 2. juli, vann ÍF 3-0.

NSÍ-Skála:

# Skála skal verja oddasessin

**Manningarliga er støðan tann sama á Skála, og í Runavík sakna teir miðvallaran, sum breyt nøsina í Gøtu síðsta sunnudag**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Talan er um rættuligt tak, tá ið Skála í morgin skal út í Runavíkina. Skála er framvegis oddalið, men úrtøkan hevur ikki verið so stór eftir summarsteðgin, sum hon var undan summarsteðginum. Í seks dystum hevur Skála fingið tólv stig, og málmunurin er 14-6. Tvær tær seinastu ferðirnar hava teir spælt javnt - málleyst í Klaksvík og 1-1 á heimavølli móti HB.

Í orðsins sanna týdningi hevur tað seinastu vikurnar haltað eitt sindur á Skála. Bjarni Jørgensen hevur verið saknaður, og tað verður hann eisini í morgin. Hann hevur framvegis so mikið stórar skaða trupulleikar at dragast við, at hann ikki fær vant við fullari ferð. Teir hava vónað, at Alexandur Johansen skuldi hjálpa til nú fram móti kappingarenda. Hann spældi í Klaksvík, men hann var ikki við móti HB, og hann verður ikki millum teir fyrstu ellivu í Runavík.

Fótbóltsprátið er øgiligt á Skála, og tað fara maður og kona av húsi og út til Runavíkar seinnapartin í morgin.

- Um vit skulu varðveita oddasessin, so mugu vit syrgja fyri okkum sjálvum. Tí fara vit, soleiðis sum vit altíð gera tað, eftir sigrinum móti NSÍ, siga teir á Skála, sum aftur hesa ferð fara at hava Eugen Voda í málinum.

Tá ið Skála í 9. umfarinum 16. mai var í Runavík, vann NSÍ 1-0. Tá ið NSÍ í fimtanda umfarinum 2. juli var á Skála vann heimaliðið 3-1.

### Hava tryggjað sær fólkið

Í Runavík løgdu teir hóskvøldið seinastu hond á fyrireikingarnar til stórdystin í Runavíkar kommunu. Inntil fyri stuttum høvdu teir frí mikukvøld og vandu fríggjakvøld. Seinastu vikurnar hava teir vant mikukvøld og hildið frí fríggjakvøld.

Hóskvøldið var lítið hátíðarhald. Tað var í sambandi við, at heimasíðan - nsi.fo - sum ikki hevur verið á skránni í ár, nú er komin fyri seg aftur og í nýggjum hami. Samstundis vórðu sáttmálar undirskrivaðir við fleiri av spælarunum, sum hava bundið seg at spæla við NSÍ næsta ár. Millum hesar eru Jens Martin Knudsen, Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Christian Høgni Jacobsen, Jónstein Petersen, Jústinus R. Hansen, Helgi L. Petersen, Hjalmar Dalbúð, Tórður Thomsen og Andy Olsen. Tað er eisini greitt, at Trygvi Mortensen heldur fram sum venjari, og at Bogi Lervig eisini næsta ár verður hjálparvenjari í Runavík.

Í teimum seks dystunum síðani summarsteðgin hevur NSÍ fingið eitt stig meiri enn Skála. NSÍ úrtøkan hevur verið trettan stig við málmuninum 15-11.

Tá ið teir sunnudagin vunnu 5-1 í Gøtu var døkki bletturin, at miðvallarin Kári Hansen tíðliga noyddist skaddur av vøllinum. Nøsin var brotnað í tveimum støðum, og tað verður ikki mett serliga sannlíkt, at veteranurin verður førur fyri at spæla nakað serligt afturat í ár. Allir hinir, sum vóru við í stórsigrinum, eru tøkir.

- Skála hevur ógvuliga gott og væl skipað lið. Avbjóðingin hjá okkum er stór, men vit halda okkum vera væl fyri, og vit fara at gera okkara ítarsta. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað fer at røkka í morgin og í samlaðu uppgerðini eftir 27 umfør, siga teir í Runavík.

## Dystaryvirlit

**Fótbóltur - Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 25.09 | KÍ-ÍF | Jens P. Brattalíð |
| 25.09 | HB-VB | Lassin Isaksen |
| 25.09 | NSÍ-Skála | Páll Augustinussen |
| 25.09 | TB-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 25.09 | EB/S-B36 | Dagfinn Olsen |
| **2. deild** | | |
| 24.09 | LÍF-AB | Jónleif Frederiksen |
| 24.09 | GÍ-Royn | Dan Højgaard |
| 24.09 | HB-B36 | Jens P. Brattalíð |
| 24.09 | Sumba-FSV04 | Hans F. Hansen |
| 24.09 | B71-B68 | Petur Reinert |
| **3. deild** | | |
| 25.09 | Skála-SÍ | ÍF |
| 25.09 | NSÍ-Fram | Eugen Voda |
| 25.09 | HB-B68 | Jónleif Frederiksen |
| 25.09 | KÍ-ÍF | Jan á Líðarenda |
| **1. deild** | | |
| 18.09 | GÍ-EB/S | ÍF |
| 18.09 | B36-FSV04 | Fram |
| 18.09 | AB-KÍ | Laurits í Króki |
| **Hondbóltur - Atlantic Airways-kappingin** | | |
| 24.09 | Neistin-StÍF | Dánjal Samuelsen & Heri Petersen |
| 24.09 | H71-Kyndil | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 24.09 | VÍF-KÍF | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| **Sunset-kappingin** | | |
| 24.09 | Søljan-VB | Kristian Joensen & Karstin Joensen |
| 24.09 | Stjørnan-Kyndil | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 24.09 | Tjaldur-StÍF | Hallur Danielsen & Petur Skeel |
| 24.09 | VÍF-Neistin | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

# Spenningurin er kyknaður av nýggjum

**Eftir at oddafiskurin, IM Johan Eriksson, hóskvøldið tapti, og Heini Olsen samstundis fekk fult, skuldi talvið teirra millum fríggjadagin verða rættuliga avgerandi**

TALV
*Jóannes Hansen*

Tað kom nýtt lív í aftur toppstríðið í Klaksvík International hóskvøldið. Svenski IM, Johan Eriksson, sum undan triði síðsta umfarinum var hálvt annað stig frammanfyri Hans Kristian Simonsen og tvey stig frammanfyri Heina Olsen, tapti við svarta fólkinum móti IM Jens Ove Fries-Nielsen. Danski telvarin hevði ikki fingið fult í nøkrum av teimum fyrstu sjey umførunum, og svenski telvarin hevði ikki tapt í sjey teimum fyrstu umførunum.

Hans Kristian Simonsen hevði harvið møguleikan at vinna seg inn á svenska telvaran soleiðis, at frástøðan bara gjørdist eitt hálvt stig. Tað eydnaðist ikki hjá Hans Kristiani. Við svarta fólkinum tapti hann móti Heina Olsen, sum harvið gjørdist næstfremstur. Undan 9. og næstseinasta umfarinum, sum er á skránni fríggjadagin klokkan 14, var Heini eitt stig aftanfyri IM Johan Eriksson. Teir báðir setast klokkan 14 fríggjadagin yvirav hvørjum øðrum. Heini hevur svarta fólkið. Tá ið teir báðir hittust fyrr í kappingini, endaði talvið remis.

Longsta talvið hóskvøldið var tað millum Eirik Gullaksen og Helga Dam Ziska. Eftir 44 leikir sattaðust teir við remis.

Í hinum báðum talvunum var talan um eirindarleyst álopsspæl. Heini leyp á, og Hans Kristian lúrdi støðugt við mótálopi. Tað eydnaðist Heina at innibyrgja frúnna hjá Hans Kristiani og at fáa kongin hjá honum út á borðið. Tá ið Hans Kristian legði kongin eftir 26 leikir, hótti Heini við máti.

Fyrsti sigurin hjá IM Jens Ove Fries-Nielsen varð vunnin í endaspæli, har hann hevði frúgv og finnur, meðan mótstøðumaðurin, IM Johan Eriksson, hevði rók, bisp og finnur.

Støðan eftir átta umfør er henda: 1. IM Johan Eriksson 5,5 stig, 2. FM Heini Olsen 4,5 stig, 3. Hans Kristian Simonsen 4,0 stig, 4. IM Eirik Gullaksen 4,0 stig, 5. Jens Ove Fries-Nielsen 3,5 stig og 6. Helgi Dam Ziska 2,5 stig.

### Bara tapt móti føroyingum

Útlendsku luttakararnir hava allir hægri styrkistøl, enn føroyingarnir hava. IM Johan Eriksson hevur 2423, IM Eirik Gullaksen 2382 og IM Jens Ove Fries-Nielsen 2381. Av føroyingunum eigur Heini Olsen styrkistalið 2325, Hans Kristian Simonsen 2305 og Helgi Dam Ziska 2177.

Merkisvert er tað, at tær báðu ferðirnar, tá ið Heini Olsen hevur tapt, so hevur tað verið móti føroysku mótstøðumonnunum. Heini hevur vunnið annað talvið og tapt hitt talvið móti Hans Kristiani Simonsen, og hann hevur vunnið annað og tapt hitt talvið móti Helga Dam Ziska. Í tveimum teimum seinastu umførunum skal Heini Olsen telva móti útlendingum.

Í næstseinasta umfarinum, sum var á skránni fríggjadagin klokkan 14, skuldu allir teir føroysku telvararnir sita yvir av útlendsku mótstøðumonnum: IM Johan Eriksson-FM Heini Olsen, Hans Kristian Simonsen-IM Eirik Gullaksen og IM Jens Ove Fries-Nielsen-Helgi Dam Ziska. Í dag klokkan 11 verður 10. og seinasta umfarið. Tá sær skráin soleiðis út: Helgi Dam Ziska-Hans Kristian Simonsen, IM Eirik Gullaksen-IM Johan Eriksson og FM Heini Olsen-IM Jens Ove Fries-Nielsen.

Fjórða Klaksvík International er í Leikalund, sum heldur til í gomlu handilshúsunum úti í Klaksvík.